VI‹MERKINGAR

Vi›urkenning av tí føroysku tjó›ini

Zakarias Wang



Sagt ver›ur, at ein vika er long tí› í politikki, og nú hava vit enn eina fer› fingi› prógv fyri hesum.

Tá henda vikan byrja›i, sá alt svart út fyri Føroyum. Danir hóreiggja›u sær sum ongantí› fyrr, og hildu væl til standa.

Men nú er vi›vent í holuni. Vit fingu til okkara frøi at hoyra, at føroysku politikarnir stó›u sum ein ma›ur ímóti tí donsku stjórnini, sum ætla›i at fáa sær ein feitan bita her í Nor›uratlantshavi.

Tí í øllum tí tosi, sum er um fólkarætt og tjó›arrætt í hesum døgum, so skulu vit minnast til, at tá i› tvey lond eru gingin saman um at vera ein fólkarættarlig eind mótvegis útheiminum, so skulu framvegis fólkarættarreglur n‡tast til at avgera hvat i› er rætt og skeivt í samskiftinum millum hesi framvegis sjálvst‡randi lond.

Ein av hesum reglum er, at skal anna› landi› gerast ein partur av hinum landinum og tjó›tess avtakast, so skal ta› samtykkjast av hesum landinum sjálvum.

Av tí, at ta› er fullkomin semja millum allar teir føroysku flokkarnar um, at vit aldrin hava samtykt at vit eru ein partur av donsku tjó›ini, so at vit sum búgva her eru danir, er ta› tí fullkomuliga greitt, at vit ikki hava slept okkara stø›u sum eitt land, sum er javnbjó›is vi› Danmark.

Men fyri danir er stø›an verri enn so.

Teir hava aktivt veri› vi› til at samtykt at føroyingar eru ein tjó›. Hetta gjørdu teir, tá i› amtma›urin tann 31. marts 1948 kunngjørdi heimast‡rislógina á føroyskum í Kunnger›arsavninum, tí har hevur hann skriva› undir uppá, at føroyingar eru ein tjó›. Amtma›urin var ikki hvør sum helst, tí hann kundi bert gera naka›, um stjórn hansara gó›kendi ta›. Helt danska stjórnin ta› vera skeivt, sum amtma›urin kunngjørdi, so kundi hon s‡tt honum í at skriva undir l‡singina, men ta› gjørdi stjórnin ikki.

Donsku politikararnir kunnu so í dag harmast um, at teir hava gjørt hetta, sum teir nú halda vera eitt mistak. Men ta› sleppur teimum ikki undan at teir hava vi›urkent ta føroysku tjó›ina, og at føroysku politikarnir hava fullkomuliga rætt í tí teir siga um tjó›arrættindi okkara.

Hjálp!

Nemus Nap. Djurhuus

eg havi fingi› samleikatrupulleikar (identitetskrisu)

Vakna›i í morgun og iva›ist, um eg skuldi fara upp ella leggja meg aftur. Men so var ta› eg helt, at best mundi vera at skriva seg úr hesum trupulleika. Tí bi›i eg onkran hjálpa mær at loysa mín trupulleika. Og vónandi fái eg okkurt svar.

Her er so skrivi›:

Til rætta vi›komandi!

Eri eg føroyingur, tí eg búgvi í Føroyum, sum er ein tjó›, og ger hetta meg til føroying

ella

eri eg føroyingur, tí eg eri dani, sum er fastbúgvandi í Føroyum og ger hetta meg til føroying

ella

er ta› okkurt heilt anna›, sum eg ikki havi hugsa› um, sum ger meg til føroying

Vi›merking til samrø›u vi› Birgir Danielsen

fyrrverandi løgtingsmann Fólkafloksins

Jógvan Mørkøre

Jan Müller, bla›ma›ur hevur í mikudagssosialinum eina samrø›u vi› fyrrverandi tingmann Fólkafloksins, Birgir Danielsen. Greinin reisir tíverri fleiri t‡›andi spurningar, enn hon svarar. Flestu teirra átti bla›ma›urin duga› at sett sjálvur. Teir ver›a av einihvørji orsøk ikki settir, og tí loyvi eg mær at seta teir fram. Fyrst og fremst tí ta› í verandi stø›u og fyri framtí›ina hevur ómetaliga nógv størri áhuga, hvat i› Fólkaflokkurin ætlar og vil standa fyri, enn hvat i› ein fólkaflokslimur heldur um ein samstarvsfelaga í samgonguni.

Greinin sigur m.a., at løgma›ur - ein royndur og listinlærdur fólkaflokspolitikari - er drigin eftir hárinum av tí n‡ggja lei›aranum í tjó›veldisflokkinum á ein hátt, so hann, Fólkaflokkurin, er komin í andsøgn vi› ta›, sum fólkaflokspolitikkur eigur at ver›a.

Henda í mangar mátar margháttliga l‡sing av politisku stø›uni í dag skal eg ikki gera vi›merkingar til, men eg vil heldur seta nakrar spurningar, sum mong munnu seta sær. Tá hugsi eg bæ›i um fólkafloksfólk og onnur vi› áhuga fyri politikki:

1. Hevur landsst‡ri› ikki hildi› seg til samgonguavtaluna, tá i› ta› hevur samrá›st vi› donsku stjórnina?

Málini, i› samgongan her setur sær í sjálvst‡rispolitikkinum, er mest av øllum fólkaflokspolitikkur, samanberst tú, hvat i› ymsu sjálvst‡risflokkarnir fóru til val uppá. Ta› er ikki sørt, at lei›andi fólkaflokslimir hava breggja› sær av hesum sí›ani, so eg hugsi ikki, at henda metingin átti at gingi› nøkrum í Fólkaflokkinum ov nær.

Hevur landsst‡ri› ikki hildi› seg til samgonguskjali›, so skilji eg væl, at fólkaflokslimir ilskast. Men kortini, hetta skuldi so veri› eitt innanh‡sismál, har flokkurin b‡›ur egna løgmann sín at halda seg til ta kós, flokkurin hevur stungi› út.

Birgir Danielsen kemur als ikki inn á samgonguskjali› og heldur ikki inn á valuppleggi›, har Fólkaflokkurin í lítlum bóklingi í fáum og grei›um or›um leg›i fram, hvussu hann vildi skipa vi›urskiftini millum Føroyar og Danmark. Ta› er so framvegis ta›, i› Fólkaflokkurin



bor›rei›ir vi› á alnótini, hyggur tú har.

Lesur tú ta›, i› Fólkaflokkurin hevur sett sær fyri at fremja, og samanberst vi› ta›, i› Birgir Danielsen sigur í samrø›uni, undrast tú á. Tak t.d. hesi or›ini hjá Birgi Danielsen, solei›is sum hann ver›ur endurgivin í samrø›ugreinini:

"Mítt bo› og helst bo›i› hjá mongum ø›rum vi› ...... er at seta eina menningarprosess í gongd, hvar vit yvirtaka ávís politisk øki, sum vit eisini gjalda fyri. So mugu vit síggja, hvat vit kunnu gera uppá 15 ár og um vit til ta tí› eru før fyri at taka ta› stig, sum lei›slan í Tinganesi vil taka í dag. Hetta er torført at siga, tí ta› er tengt at, hvussu vit fara at klára okkum."

Næsti spurningur fylgir næstan av sær sjálvum, tá tú lesur hetta:

2. Er ein meiriluti innan Fólkaflokkin, sum Birgir Danielsen ger seg til talsmann fyri, farin undir at endursko›a ta›, flokkurin fór til val uppá í hesum máli?

At ta› eru ymiskar ásko›anir innan Fólkaflokkin í hesum vi›urskiftum er einki n‡tt. Ta› var honum í holdi› bori›, tá i› Vinnuflokkurin og tey, i› saman vi› Jóannesi Paturssyni fóru úr Sjálvst‡risflokkinum, leita›u saman og stovna›u Fólkaflokkin. Ta›, sum er áhugavert í verandi stø›u og fyri framtí›ina, er, hvør ásko›an vinnur og sleppur at mynda flokkin. Sum ta› er í løtuni er ta› ógjørligt at gera sær eina grei›a mynd av, hvat i› Fólkaflokkurin vil í sjálvst‡rismálinum.

Vóni, at hesir spurningar kunnu koma meira fram í or›askiftinum, sum nú fer fram. Anna›hvørt so Birgir Danielsen ella a›rir framstandandi fólkaflokslimir, i› nú leggja til brots fyri at fáa lagt á annan bógv, vilja gera so væl at svara teimum. Ella tí›indafólk vilja fremja almenna or›askifti› vi› at hava spurningar av hesum slag fremri, so vit fáa grei›u á, hvat politisku flokkarnir vilja og ætla sær.

Politikkur er at vilja !!

Ey›gunn Samuelsen
b‡rá›slimur.

Hesi or› eru blivin ví›agitin og ta› var Olof Palme i› er kendur fyri at siga tey.

Og tey eru so sonn sum tey eru søgd. Ta› vikrar fyri mær sum fólk halda, at ta› ber ikki til at n‡ta peningin i› Klaksvíkar Komuna fær inn í skatti› ør›vísi enn gjørt ver›ur. Ti dømis siga fólk ofta, vit hava ikki rá› at gera svimjihøllina, byggja òsáskúlan út ella gera skúlan á Ziskatrø lidnan skjótari enn nú. Hetta er

als ikki so !!!

Tey sum komandi í b‡rá›i›, og eru í samgongu velja hvat tey vilja n‡ta peningin til !!!

Um peningurin skal n‡tast til vegir og havnir fyrst og at ta› sum sí›an leypur av ver›ur smáb‡tt millum tey bleytu økini, su hevur veri› gjørt tey seinastu nógvu árini í Klaksvík er tí teir politikarir i› hava siti› hava valt at gera so.

Tá i› vit so hugsa um, hvørjum standi nógvir av okkara vegum eru í og at summi enntá

Iiki hava ein lidnan veg til húsini enn, so er ta› heilt ótrúligt, tá i› vit vita at Klaksvíkin hevur haft eina lániskuld á yvir 200 milliónir og at meginparturin er n‡ttur til henda partin.

Eitt anna› gott dømi› um at ta› ber til um ein vil, er barnaansingin. Ongin politikari fór til val fyri f‡ra árum sí›ani uppá at loysa barnaansingartrupuleikan, hann var til tá, men teir flestu vistu kanska ikki um hann.

Hesi 4 árini hava víst, at ta› ber til at gera naka› vi› trupulleikarnar um vit vilja. Økingin í fíggjarætlanini hjá kommununi hesi 4 árini kemur stórt sæ› av at vit hava n‡tt meira pening til barna ansingina.

So um tú ynskir at pengarnir vera n‡ttir ør›vísi enn teir hava veri›, so er bert at velja fólk í b‡rá›i› i› vilja.

Tórshavn Vár Mi›stø› og Tjó›veldisborg

Johan Mortensen
Valevni fyri Tjó›veldisflokkin

Tjó›veldisflokkurin er flokkur teirra ungu. Flokkur teirra ungu føroyinga, sum hava fagrar dreymar og djarvar hugsjónir um eitt sjálvstø›ugt land. Eitt land sum a›rar tjó›ir hava vir›ing fyri.

Her b‡r gott fólk í gó›um landi hóast ta› ídag eru teir landsmenn okkara sum hava tann frekleika at seta spurnartekin vi› um hetta land kann rópast ein sjálvstø›ug Tjó› !

Framtí›in hjá okkum sum Tjó› ver›ur avgjørd av teimum ungu veljarunum., eisini teimum mongu sum



fyri fyrstu fer› fara á B‡rá›sval. Geri› hetta val til eina álitisváttan fyri Fullveldi› sum allir rættsikta›ir Føroyingar taka undir vi› av heilum tjó›skaparhjarta.

Tjó›veldisflokkurin er flokkur teirra ungu.

Geri› høvu›ssta›in til føroya Mi›stø› og Tjó›veldisborg.

Spælimenninir fyri 3 milliónum áhoyrarum



Spælimenninir leiktu leygardagin fyri 3 milliónum lurtarum. Hetta kann hoyrast og síggjast á alnetinum
Myndvi›ger›: Álvur Haraldsen

Spælimenninir í Hoydølum kalla›ust tey fyrr, menn tey fer›ast ví›a. N‡liga spældu tey fyri stórum lurtaraskara í USA og til ber at síggja og hoyra hetta á alnetinum

TÓNLEIKUR
Dagfinn Olsen

Spælimenninir eru óiva› tann tónleikabólkur í Føroyum, i› hevur veri› virknast og er komin longst uttanfyri landoddarnar.

Spælimenninir hava júst veri› á enn eini konsertfer› í USA og leiktu har 14 konsertir.

Leygardagin 28. oktober spældu Spælimenninir á eini útvarpsstø› í Minnesota. Eini 3 milliónir lurtarar eru til stø›ina. Nærum alt USA hoyrir stø›ina.

Spælimenninir hava fleiri fer›ir á›ur vitja› í USA og hava 4 fer›ir á›ur spælt á útvarpstø›ini. Hetta í árunum 1980 til 1990.

Til ber at síggja og enntá hoyra framførsluna hjá teimum. Talan er um eitt væl umtókt útvarps-show.

Tr‡stir ein seg inn á www.prairiehome.org og sí›ani leitar til Show Archive - october 2000, (28.okt.) so ber til at síggja og hoyra Spælimenninar live.

Umframt tónelikin, so er prát og ta› er sera hugnaligt og skemtiligt, tú verturin og limirnir í Spælimonnunum kennast væl frá undanfarnum luttøkum.

Minnisvar›in í Vági dagførdur

Minnisvar›in í Vági var dagførdur allahalgannadag og ein pláta løgd afturat. Á henni eru nøvnini á teimum 11 vágbingunum, i› hava lati› lív á sjónum sí›ani 1979
Mynd: Heri Mortensen

Minningarhald var eisini í Vági 1. november, allahalgannadag.

ALLAHALGANNADAGUR
Dagfinn Olsen

Minningarhald vóru kring landi› tann 1. november, minningardag teirra, i› fórust á sjónum.

Í Vági var› ein pláta løgd afturat teimum verandi plátunum. Á hesi n‡ggju plátuni eru nøvnini á teimum, i› sí›ani 1979 eru farnir á sjónum. 11 Vágbingar hava lati› lív á sjónum sí›ani 1979.

Sjómanskvinnuringurin í Vági skipa›i fyri tiltakinum og eftir minningarhaldi› var ein drekkamunnur at fáa í Meingheitshúsinum.

Ólavur Rasmussen, prestur í Hvalba, tala›i vi› minningarhaldi› í Vági.

Skal kryvja 15.000 tons árliga

Í Klaksvík eru menn farnir undir at kanna møguleikarnar fyri at byggja eitt kryvjivirki til 15.000 tons av laksi árliga

FISKIVINNA
Dagfinn Olsen

Ta› eru P/F Faroe Salmon og P/F East Salmon í Klaksvík, i› ætla undir at byggja eitt kryvjivirki.

Jón Purkhús, stjóri á Faroe Salmon, sigur vi› Nor›l‡si, at teir hava kanna› møguleikarnar fyri at fáa ein av verandi virkisbygningum í Klaksvík til endamáli›. Men teir eru komnir til ta ni›urstø›u, at skal eitt vælvirkandi hús fáast til 15.000 tons av laksi árliga, so er besta loysnin at byggja ein n‡ggjan bygning.

Menninir aftanfyri ætlanina um eitt laksakryvjivirki til 15.000 tons av laksi árliga fara nú at søkja kommununa um byggiloyvi á vestursí›uni av Klaksvíkini til eini hús, i› ver›a 70x20 metrar, ella um 2100 fermtrar.

Faroe Salmon hevur eisini ætlanir um at ví›ka, sigur Jón Purkhús vi› Nor›l‡si.

Hann sigur, at Faroe Salmon hevur ætlanir um at byggja eina høll sunnanfyri smoltstø›ina í Knúsdali á Kalsoynni. Hetta er ein høll uppá 700 fermetrer. Byggiloyvi› er fingi› til vega frá Húsa Kommunu.

Ætlanir eru eisini um útbygging nor›ureftir, um loyvi fæst til hetta, sigur hann vi› bla›i› lokalbla›i› í Klaksvík.

Sølustevnan SøluRásin 2000

Skráin:

Leygardagin 4. november

Kl. 15.00	SøluRásin 2000 letur upp
Kl. 15.45	Stevnan verður sett av Jógvan Fríðriksson
Kl. 16.00	Ungdómskórið á Strondum syngur
Kl. 18.00	Mótasýning
Kl. 18.30	Barnasjónleikur
Kl. 20.00	Mótasýning
Kl. 21.00	Vísumenn undirhalda
Kl. 21.30	Dráttur millum seld atgongumerkir
Kl. 22.00	Stevnan letur aftur

Sunnudagin 5. november

Kl. 15.00	SøluRásin 2000 letur upp
Kl. 15.30	Magni Christiansen syngur
Kl. 16.30	Klovnar undirhalda á pallinum
Kl. 17.00	Mótasýning
Kl. 17.30	Vørutombola í bygdasalinum
Kl. 19.00	Vísumenn syngja
Kl. 20.00	Mótasýning
Kl. 21.00	Jónsvein og Birgir syngja á pallinum
Kl. 21.30	Dráttur millum seld atgongumerkir
Kl. 21.45	SøluRásin 2000 endar

Vælkomin!